# Nú er klárt at spæla

**Lutakast hevur verið til spennandi fótbóltskappingina fyri tónleikarar, og nú er greitt at leypa á leygardagin**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*



Leygardagin kl. 13.00 byrjar ársins innandurakapping í fótbólti. Tá fara tónleikarar og onnur við tilknýti til tónleikaheimin at kappast í høllini á Kambsdali.

21 lið hava teknað seg til kappingina, og tey hittast í innleiðandi bólkum. Tvey lið spæla seg víðari úr hvørjum bólki til millumspæli í kappingini. Síðani verða hálvfinalur og finalur.

At enda verður ein stórur vinnari funnin, og hann fær ferðasteyp, sum 3'arin letur. Harafturat letur Restorffs eisini virðisløn til trý tey fremstu liðini.

Lutakast hevur verið til bólkaspæli, og her var drigið frítt millum øll liðini. Eingin styrkismeting var gjørd frammanundan, og úrslitið var fylgjandi.

## Bólkarnir

Bólkur A: Mentanarhúsið í Fuglafirði, Ataja, Dynamitt, All That Rain/Masha, Mjølnir og Atlas/Fuglafjarðar Manskór.

Bólkur B: Radiohøvdini, Lawetz, MC Hár, Blood of Lucifer og FC Nólsoy.

Bólkur C: Playmate, Truttirut, Grót, Terji Rasmussen og Dryspell.

Bólkur D: Gestir/Fluffy Toys, Bumba rímar við Sumba, Ludomania, Devalu og Platform.

## Ordans tiltak

Spælt verður við vanligum hondbóltsmálum, eingin hevur loyvi at taka bóltin við hondunum, og dømt verður annars eftir vanligu fótbóltsreglum. Spælararnir skulu tó ansa sær við hørðum taklingum.

Fýra spælarar eru á vøllinum í senn, men tað er frí útskifting. Teir fýra á vøllinum kunnu allir spæla um allan vøllin samstundis.

Kappingin byrjar kl. 13.00, og tað tekur ein góðan tíma at avgreiða hvønn innleiðandi bólk. Kappingin verður liðug áðrenn kl. 19.00.

Aftaná verður veitsla í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, har tónleikarar fara at sessast til kalt borð. Frá kl. 23.00 verður almennur dansur, og har fara nógvir góðir tónleikarar á pallin. Nevnast kunnu nøvn sum Kim Hansen, James Olsen, Terji Rasmussen og onnur. Eisini verður platuvendari.


## Master útbúgving í leiðslu og fyrisiting

BP/Shell hava gjørt av aftur at stuðla einari Master útbúgving í samstarvi við Robert Gordon Universitetið í Aberdeen og Føroya Handilsskúla. Útbúgvingin verður skipað sum parttíðarundirvising og fjarlestur. Tann lesandi kann nema sær eina fullfíggjaða Master útbúgving, sama hvar hann býr. Sostatt hava fólk í útjaðaraøkjunum somu møguleikar at luttaka, sum tey, ið búgva í miðstaðarøkinum.

Tá ið útbúgvingin byrjar, verður skipað fyri felags kunningardegi. Tá ið hvør lærugrein byrjar, verður undirvíst í Føroyum í tveir dagar. Undirvisingin fer síðani partvíst fram um internetið og partvíst sum fjarlestur.

Útbúgvingin er býtt upp í trý eitt árs skeið. Hvørt árið gevur endaligt prógv, og er tað upp til tann lesandi, um hann heldur áfram øll trý árini.

| | Lærugreinir: | Heiti, eftir lokna próvtøku: |
|---|---|---|
| 1. árið: | The Business Environment, Managing People, Finance for Managers, Marketing | -*Post Graduate Certificate* |
| 2. árið: | Human Resource Management, Planning and Decision Making Economics of Business, eBusiness Systems | -*Post Graduate Diploma* |
| 3. árið: | Høvuðsritgerð | -*Master Degree* |

Umsøkjarin skal hava lisið í trý ár á universiteti ella líknandi hægri lestrarstovni.

Útbúgving sum fólkaskúlalærari, skipsførari, maskinmeistari og frá hægri handilsskúla o.l. útbúgvingar, kunnu eisini geva atgongd til upptøku. Eisini kunnu drúgvar førleikagevandi arbeiðsroyndir geva rætt til upptøku.

Kunnandi fundur verður fríggjadagin 21. mars 2003 kl. 17:00, á Føroya Handilsskúla í Havn. Umboð frá Robert Gordon Universitetinum í Aberdeen luttaka.

Umsóknarfreistin er týsdagin 25. mars 2003. Umsóknarbløð fáast við at venda sær til Føroya Handilsskúla. Sí annars www.fh.fo

Útbúgvingin byrjar 25. apríl 2003 kl. 10:00

Áhugað eru vælkomin at seta seg í samband við Føroya Handilsskúla á tel 317177 ella við teldupostí: en@hsh.fo, at frætta nærri um útbúgvingina.

THE ROBERT GORDON UNIVERSITY ABERDEEN
FØROYA HANDILSSKÚLI
bp


# Prix-kvøld á Platform

Fríggjakvøldið verður fyrsta av fleiri Prix-kvøldum á dansistaðnum Platform í Havn. Fyrsta kvøldið fara bólkarnir Déjá Vú og Páll Finnur Páll at spæla, men aðrir bólkar fara eisini at spæla í næstum

Platform í Havn fer nú undir eina røð av livekvøldum við bólkum, sum hava verið við í Prix Føroyum í ár. Fyrsta av hesum kvøldum verður fríggjakvøldið 22. mars. Tá fara havnabólkarnir Déjá Vú og Páll Finnur Páll at spæla.

Tiltakið er skipað soleiðis, at frá kl. 23.00 til 01.00 fara bólkarnir at spæla, og aftaná verður dansur. Kostnaðurin áðrenn kl. 01.00 er 50 krónur, meðan tað kostar meira at koma inn aftaná. Hetta verður gjørt fyri at fáa fólk at koma so tíðliga sum gjørligt.

Onnur Prix-kvøld verða eisini á Platform, og hóast endaligu dagfestingarnar ikki eru settar á kvøldini, kunnu fólk vænta sær bólkar sum Hatespeech, Flux og Gestir á pallinum í Platform.


**Snarferð til Billund**
- við flogfari og gisting í 2 nætur í Billund
frá kr. 2.185* t/r fyri hvønn

MAERSK AIR




# Vælgagnist

**Næmingar í 10. flokki í Vestmanna skúla hava havt verkætlan sum lið í undirvísingini, har tey hava sett á stovn og rikið matstovu í skúlanum**

MATSTOVA
*Edvard Joensen*



*Næmingarnir hava sálvir gjørt alt, boðið verður í kantinuni í Vestmanna skúla hesa vikuna. Frikadellurnar verða steiktar í skúlakøkinum.*

**Vestmanna:** Næmingarnir í 10. flokkunum í Vestmanna skúla hava gjørt matstovu í skúlanum. Hetta er úrslitið av árligu verkætlanini hjá skúlanum, og bæði næmingar og lærarar lata væl at.

Flokkarnir hava býtt seg í bólkar, fimm í tali, greiðir Bogi Hansen, sum er ein av næmingunum, frá. Hann sigur, at bólkarnir hava fingið hvør sína uppgávu at umsita, og at tað tykist hava riggað bara heilt væl.

Ein bólkur hevur havt við alt innkeypt at gera. Ein annar stendur fyri matgerðini. Ein triðji hevur gjørt reklamu fyri tiltakinum. Tann fjórði hevur verið runt og hugt at, hvussu aðrir skúlar hava skipað sínar matstovur, meðan tann seinasti er tann, sum kallaður hevur verið nevndin, og skal halda skil á øllum.

Næmingarnir hava kannað og lagt til rættis eina matstovu í skúlanum. Heilt frá byrjan til enda, nú tey flýggja út mat til næmingar og lærarar á skúlanum.

Vit hava verið á støðum sum Læraraskúlanum, Studentaskúlanum í Hoydølum og á Føroya Handilsskúla og hugt at, hvussu kanitinurnar virka har, greiða tey frá.

– Síðan hava vit gjørt av, hvat vit ætla at hava av tilboðum í matsovuni her. Tá tað var avgjørt, varð biðið um tilboð frá ymsum heilsølum upp á tað tilfar, sum brúkast skuldi, og síðan keypt.

Matin gera tey sjálv. Alt sum er. Baka pizzasniglar og steikja frikadellur. Skera grønmeti til salat og gera eplasalat. Tvíflísar (sandwich) gera tey eisini, og har eru eitt nú egg í, sum tey kóka. Skinkan er kortini keypt liðug. Grísarnar hava tey ikki til taks.

Næmingunum dámar væl. Bæði teimum, sum luttaka í verkætlanini, og teimum, sum bara fáa at eta burturav.

Næmingarnir siga, at teimum dámar eisini at sleppa undan tí dagliga matpakkanum og halda tað vera eitt gott hugskot við kantinu í skúlanum.

Eitt, sum bæði næmingar og lærarar nevna, er, at nú slepst eisini undan matroykinum, sum altíð er í stovuni, tá byrjað verður aftur eftir matsteðgin.

Eisini bygdarráðið hevur víst tiltakinumáhuga, siga næmingarnir. Tá tiltakið er endað, fær bygdarráðið úrlsitini av teimum royndum, tey hava gjørt, og so kunnu tey liggja til grund fyri, um arbeitt verður víðari við eini fastari kantinu í Vestmanna skúla.




*Fýra ymiskar menuir eru at velja ímillum. Pizzasniglar við salati er ein. Næmingarnir hava sjálvur bakað og skorið.*



*Lærararnir Sarita Eriksen og Augusta Egholm Petersen hava 0eisini fingið sær í kantinuni. Tær lata væl at tiltakinum*